# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

# Fjølmiðlar fyri allar føroyingar




Allir føroyskir fjølmiðlar hava fingið nakað at hugsa um, eftir at lurtarakanningina hjá Kringvarpinum og Gallup. Kanningin er sera áhugaverd og gevur eina mynd av viðurskiftunum millum føroyska brúkaran og føroyskar fjølmiðlar. Hóast vit sjálvsagt kundu hugsað okkum onnur tøl í ávísum talvum, so fegnast vit um, at okkara miðlar Sosialurin, Rás 2 og Portalurin, undir felagsheitinum Miðlahúsið samlað hava álit og undirtøku millum føroyingar. Vit liggja eisini væl, tá talan er um kritiskan tíðindafluttning. Her er sostatt fyri okkum nógv jalig kunning í tilfarinum, og tað fegnast vit um, og tað eggjar okkum at liggja fast á takinum. Men vit fara hinvegin sjálvsagt alt fyri eitt at fremja ta sjálvsrannsakan, sum Gallupkanningin eisini eigur at elva til. Kanningin peikar á nakrar veikleikar í okkara fjølmiðlakervi, sum vit sjálvandi fara undir at rætta og bøta um. Hetta er ein av mongum fortreytum fyri at vit kunnu bjóða lesarum, lurtarum, lýsarum og øllum føroyingum eitt fjølmiðlatilboð, sum gerst alt dygdarbetri, breiðari, meira viðkomandi og meira áhugavert.

Tað er okkara fremsta mál og ynski at skapa dygdargóðar, fjølbroyttar og álítandi fjølmiðlar. Vit vita væl, at enn er langt á mál. Hinvegin er bert stutt fráliðið, síðan blaðið varð keypt frá politiskum flokki og harvið gjørdist ein púra óheftur miðil. Hetta gevur okkum heilt nýggjar menningarmøgukleikar, sum vit eru avgjørd í at vilja troyta til fulnar. Vit hava, uttan at hetta skal tykjast sum sjálvrós, framúr góðar fortreytir, møguleikar og karmar. Vit hava eitt vælútbúgvið ungt lið av eldhugaðum starvsfólkum í øllum okkara deildum. Hetta er galdandi fyri journalistar á blað, Rás og Portali, og hetta er galdandi fyri tekniskt starvsfólk, marknaðarfólk og starvsfólk í fyristingini – ja, stutt sagt fyri alt okkara ídna og arbeiðssama starvslið. Vit hava við Miðlahúsinum sjálvum skapt ein livandi og hugnaligan mentanardepil, sum havnarfólk eins og fólk kring alt landið hava tikið til hjartað. Vit fara ikki at spara okkum til tess, at føroyingum skal verða boðið eitt so dygdargott og fjølbroytt tilboð sum yvirhøvur tilber. Vit eru væl greið yvir ta ábyrgd, vit hava sum ein fræls og óheft pressa, sum dagliga skal kappast við almennan miðil, ið árliga við lóg fær milliónaupphæddir frá føroyskum lurtarum og hyggjarum, eins og vit skulu kappast við stóran og sterkan privatan kappingarneyta. Vit átaka okkum fegin hesa ábyrgd, og fátt er so mennandi og eggjandi sum kapping, og tí fegnast vit eisini um kappingina, hóast ójavnar treytir. Samantikið ein støða, sum ber í sær allar fortreytir fyri, at vit í Miðlahúsinum í framtíðini megna at skapa teir alrabesta fjølmiðlar fyri allar føroyingar.

**Sosialurin**

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Niels Petersen niels@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.